# Hjørleif Waag Høgnesen setti djúp spor eftir seg

Henda dagin Hjørleif Waag Høgnesen fór til gravar, eg var júst setstur í kirkjuni, tá Klaksvíkar Hornorkester, eitt korter áðrenn fyrsta felagssangin, byrjaði at spæla nakrar yndisligar bretskar hymnur. Hetta kendist hitandi, grípandi, viðkomandi og var ein tignarlig byrjan við jarðarferðina hjá organisti, ið trúgvur hevði tænt í 40 ár.

Fyri okkum, sum koma í Christianskirkjuna mest til jarðarferðir og konsertir, og vitstu, tá orgulspælið vanliga byrjaði, vóru tað fingrarnir hjá Hjørleifi, sum numu tangentarnar. Men “soleiðis var ikki ídag”! – Hetta var ein løgin kensla.

Havi kent Hjørleif frá tí eg var barn. Míni fyrstu barnaár vóru foreldur míni og barnaheimið hjá Hjørleifi, sum hann seinni saman við Torgerð og børnunum festi búgv, grannar.

Torgerð og Hjørleif giftust í 1954 og fingu børnini Turid, Eyð, Lív og Leif.

Torgerð hevur verið Hjørleifi hollur stuðul. Hevur altíð havt ljóst og livandi sinni, blídlig sum hon altíð er, hevur hon sjálvandi sett lættligan og ljósan dám á heimið.

Hjørleif fekk eg nógv og gott samstarv við, øll tey árini hann handlaði og fari at geva honum tað ummælið, at hann var rættskaffin, gjøgnumførdur, lættur at umgangast og tori at siga, at øll tey árini var ikki øvugt orð okkara millum.



Eisini komu vit á lívsleiðini heilt nátúrliga at samtala nógv um orgulspæl og felagssang, av teirri orsøk at hann spældi í kirkjuni og eg í Betesda. Vit samtalaðu, tá vit ivaðust um løgini, tá jarðarferðir vóru, og fólk kanska ynsktu onkran sang við løgum, vit ikki vanliga brúktu.

Sum við jarðarferðina fleiri ferðir kom fram í prædiku og vælvaldum orðum, hevur Christianskirkjan sera góðan felagssang undir góðari og kønari leiðslu av Hjørleifi. Ja, tað er ein fragd at hoyra. Onkuntíð, tá hann hevði tikið felagssangin upp, kundi hann bjóða mær ein biltúr, har vit í felag lurtaðu eftir sanginum og tosaðu um góðan og geandi felagssang.

Fyrstu musikalsku upplivingina eg kendi til Hjørleif var ein dagin í 1951, eg var tá 7 ára gamal, vit búðu tá á Stongunum hjá Jóan Jacob Jacobsen (Jóan Jakku á Viðareiði), har mamma vaks upp, at pápi okkara kom til hús við eini nótabók. Hann sigur við mammu: “Eg havi fingið mær eina nótabók, sum Hjørleif Waag Høgnesen hevur gjørt”! Minnist mammu siga: “Hevur Hjørleif gjørt eina nótabók”?. – Sum eitt fok tók hann Regin, eldra beiggja mín, og meg inn í stovuna, setti seg við orglið og tók hendan sangin burturúr: “Glaður ungdómsflokkur til stevnu komin er...” . Henda sangin – bara fyrsta versið stendur í nótabókini - sum Hjørleif hevur gjørt vakra kórsatsin til, sungu vit tríggir aftur og aftur tá. Eg dugi framvegis versið uttanat. – Eg arvaði nótabókina.

Bókin er vøkur við stívari permu. Útgevari er Kirkjuliga Missiónsfelagið, Alfred Petersen, trúboðari skrivaði “epilogið” 10. januar 1951.

Hjørleif og eg høvdu góðar samtaluløtur bæði um gerandislívið, søguliga, fyrætning, tónlistina og okkara andaligu felagsvirði. Eg minnist serliga eina løtu vit høvdu uppi á handilsloftinum fyri mongum árum síðani, har vit samtalaðu um bíbilsku og andaligu virðini. - Ein minnisrík løta.

Eg vitsti áðrenn eg setti meg at festa nøkur fátækslig orð á blað um Hjørleif, at ilt var at vita, hvat skuldi veljast ímillum, tí torført er at skriva um ein so virkisfúsan mann. Tí latið eg aðrir tættir – eitt nú bilasøguna, sum er serlig søga í lívið hansara - liggja.

Eftir stendur minnið um ein fjølltáttaðan og arbeiðssaman skilamann, sum livdi eftir setninginum hjá danska stómenninum A. P. Møller: “Den der har evnen, har også pligten”, men omanfyri alt hjá Hjørleifi og fjølskyldu hansara liggja orðini í Sálmi 32.1: “Sælur er tann, ið hevur fingið misbrot sítt fyrigivið”. Her er troyst at finna nú lívið her á fold fór aftur við borðinum.

**Jógvan við Keldu**


## Internetsamskipari til Smyril Line

**WWW. SMYRIL-LINE .KOM!**

Vilt tú vera við at marknaðarføra Smyril Line á netinum og at samskifta online við málbólkin hjá okkum í Føroyum, Danmark, Týsklandi og aðrastaðni í Evropa, so hava vit eitt sera spennandi starv til tín.

Vit leita eftir einum starvsfólki, sum skilir týdningin av online-samskifti, og sum kann gera Smyril Line sjónligt fyri umheiminum á internetinum. Vit leita eftir einum starvsfólki, sum hevur dirvi og vilja, og sum skilir týdningin av online-marknaðarføring.

Vit bjóða tær eitt spennandi fulltíðarstarv í einari vaksandi fyritøku, sum heldur til í Tórshavn, Keypmannahavn, Hanstolm og Kiel.

Størsta ábyrgdarøkið verður at samskipa samskiftið á netinum, syrgja fyri at Smyril Line verður sjónligt, har tað er neyðugt, millum annað á Google og øðrum leitimaskinum, skriva tekstir, viðlíkahalda heimasíður og annað.

**HØVUÐSUPPGÁVUR:**

- Styrkja Smyril Line á online-økinum
- Samskipa aktivitetir í sambandi við dagføringar o.a. á heimasíðunum
- Skriva tíðindi til heimasíðurnar
- Dagføra tekstir og myndir
- Syrgja fyri, at øll produkt eru at finna
- Syrgja fyri, at alt sær gott út
- Supportera allar skrivstovur á samskiftisøkinum

**VIT VÆNTA, AT TÚ:**

- Arbeiðir skipað og sjálvstøðugt
- Hevur royndir á økinum
- Hevur viðkomandi útbúgving
- Dugir væl at samskifta við starvsfelagaðar og onnur
- Dugir at orða teg í minsta lagi á føroyskum, donskum og enskum, bæði í skrift og talu
- Hevur royndir við CMS-skipanum

*Hevur tú spurningar um starvið, ert tú altíð vælkomin at seta teg í samband við marknaðarstjóran, Henny á Líknargøtu, á +298 551511 ella á henny@smyril-line.fo.*

*Starvið skal setast skjótast til ber, so um hetta hevur tín áhuga, verður tú vinarliga biðin um sum skjótast at senda okkum tína umsókn við teldubrævi til henny@smyril-line.fo ella við vanligum brævi til:*

Smyril Line
Yviri við Strond 1
Postboks 370
FO 110 Tórshavn

SENDISTOVAN